NS Open:

# Innandura kapping í rógving

**Leygarmorgunin klokkan tíggju fór fyrsta innandura rógvikappingin í Føroyum nakrantíð av bakkastokki. Róð varð í fýra ymiskum bólkum og nummar eitt, tvey og trý fingu heiðursmerki umframt, at vinnarin av hvørjum bólki eisini fekk ein kekk áljóðandi eitt túsund krónur**

KAPPRÓÐUR
*Solby A. Eliasen*



*Teir fýra vinnararnir frá fyrstu veruligi kappingini í rógvin á maskinum. Frá vinstru Kristian Olsen, Ebba Mortensen, Jón Rosenblad og Uni Oknadal*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Upprunaliga vóru tað seks bólkar at velja ímillum. Gentur og dreingir undir 18 ár, kvinnur lættvekt og tungvekt og menn lættvekt og tungvekt.

Men tað bleiv bert róð í fýra av hesum bólkum, tí at tað vóru ikki nóg mikið av kvinnum, sum høvdu teknað seg til. Treytin fyri at tað skuldi verða róð í bólkunum var, at í minsta lagi trý fólk høvdu teknað seg. Og so var ikki hjá kvinnunum. Men í hinum fýra bólkunum var luttakaratalið omanfyri kravda talið.

Fyrsti bólkur, sum róði vóru gentur undir 18 ár. Kappingin bleiv skipað soleiðis, at rógvararnir, í hesum førinum, genturnar fingu 20 minuttir at hita upp í, áðrenn tær fóru í holt við sjálvan róðurin. Ein róði í senn. Hetta gjørdi so tað, at kappingin bleiv nakað drúgv, men tað varð gjørt fyri at kunna hava nágreiniligt eftirlit við sjálvum róðrinum.

Genturnar, sum róðu, vóru í aldrinum 13 til 16 ár. Teinurin var 2.000 metrar og tann við bestu tíðini streyk avstað við sigrinum. Tá allar fýra genturnar høvdu róð, kundi staðfestast, at 16 ára gamla Ebba Mortensen úr Klaksvík kundi skriva søgu, sum fyrsti vinnarin av eini tílíkari rógvikapping í Føroyum. Vinnarar av hinum trimum bólkunum gjørdust hjá dreingjum, Kristian Olsen úr Klaksvík, hjá monnum lættvekt Uni Oknadal úr Klaksvík og hjá monnum Jón Rosenblad úr Lamba.

### Ikki nógvir áskoðarar

Kappingin byrjaði sum sagt klokkan tíggju um morgunin, og klokkan mundi verða farin av tvey seinnapartin, áðrenn hon var liðug. Tí kann spurnartekin setast við, hvussu drúgt tað hevði verðið, um fleiri luttakarar vóru við. Til kappingina leygardagin vóru einans tvey eftirlitsfólk, tí tað varð ikki mett at vera tørvur á fleiri. Men um talan hevði verið um fleiri luttakarar, so høvdu fleiri eftirlitsfólk helst verið, og tí hevði verið møguligt at fleiri róðu í senn.

Tað vóru ikki nógvir áskoðarar í neystinum í Klaksvík til hesa fyrstu kappingina av sínum slagi, men kortini var kappingarhuglag í hølunum hendan dagin. Serliga tá rógvararnir nærkaðust endanum av teininum, og kreftirnar byrjaðu at ganga undan, høvdu tey fáu, sum vóru til staðar hug at eggja rógvaranum til at halda fram.

Fyri tey, sum ikki hava roynt at rógva á maskinunum, kann tað tykjast at ljóða lætt at rógva 2.000 metrar á eini maskinu. Men tað sást á øllum rógvarunum, tá tey vóru liðug, at tað sanniliga ikki er bert sum at siga tað. Summi duttu stutt sagt av maskinuni, tá tey vóru liðug og vóru so liggjandi á gólvinum eina góða løtu, meðan tey royndu at fáa luftina aftur og so frætt at kreftum í beinini, at hesi megnaðu at bera tey.

Tá ein rør ein tein upp á tíð, er tað sera krevjandi kropsliga, tí ein nýtir allar kreftir, sum ein hevur ta tíð, tað tekur at rógva. Og tað gongur serliga út yvir beinini, sum allatíðina eru í gongd. Har er ongin møguleiki at steðga á og fáa sær ein vatnsopa ella nakað líknandi.


*Hóast talið av luttakarunum ikki var tað heilt stóra, so var spenningurin stórur hjá teimum, sum tóku lut í kappingini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Concept 2

Maskinurnar, sum róð varð á hendan dagin, eru tær sonevndu Concept 2 maskinurnar. Hesar maskinurnar verða eisini nýttar í altjóða kappingum uttanlanda, so her er talan um ein gyltan møguleika hjá føroyskum rógvarum at luttaka á jøvnum føti við onnur uttanlanda. Her verður hugsað um, at tá føroysku rógvararnir rógva kapp á sjónum uttanlanda, er tað við øðrum slagi av báti enn tey dagliga rógva við herheima. Eitt nú á Scilly oyggjunum.

Men her hava tey møguleika til at venja við maskinum, sum eru líka sum tær, ið útlendskir rógvarar venja við uttan at verða noydd at læra seg ein annan rógvi teknikk.

Tey seinastu árini hava alt fleiri føroysk feløg útvegað sær tílíkar maskinur. Tær verða mettar at vera avbera góðar fyri konditiónina, hóast tað als ikki kann sammetast við at rógva í tí føroyska bátinum.

Og tí helt nevndin í Klaksvíkar Róðrarfelag, at tað kundi verið áhugavert at skipað fyri eini tílíkari kapping í Føroyum. Tey byrjaðu at tosa um tað í fjør, men tað bleiv ikki til nakað. Tá so kappróðurin byrjaði aftur í ár, tóku tey prátið uppaftur, men fóru eisini meiri miðvíst í gongd við fyrireikingararbeiðið. Millum annað spurdu tey rógvarar úr øðrum feløgum á stevnum, um tey hildu, at tað var grundarlag fyri at hava eina tílíka kapping her, og útfrá áhuganum tá og eisini út frá svarunum upp á hendan spurningin á heimasíðuni hjá felagnum, bleiv avgjørt at hava eina royndarkapping. Og henda royndarkappingin var so leygardagin.

### FM kapping

Sosialurin frættir frá Klaksvíkar Róðrarfelag, at tey hava hugsað um at skipa fyri eini Føroyameistarakapping í Concept 2, men tey hava ikki gjørt nakað ítøkiligt við tað enn.

Spurningurin er, nær tað er best at hava eina tílíka kapping. Í februar, tá rógvararnir júst eru farnir í gongd aftur við venjingarnar ella eftir Ólavssøku, tá tey munnu metast at vera best fyri.

Ein vansi við at hava eina tílíka kapping beint eftir Ólavssøku er, at møguliga er hugurin til tess ikki so góðir millum rógvarar, sum vanliga eru sera troyttir av kappróðri eftir Ólavssøkuna. Hinvegin verður hon hildin, áðrenn kappingarárið er byrjað, so er stórur møguleiki fyri, at tíðirnar ikki verða so góðar, sum tær kundu verið seinni á árinum.

Ein orsøk til, at undirtøkan fyri NS Open ikki var so góð, kann nevniliga vera, at tað enn er so stutt fráliðið frá Ólavssøkuni, og tí er tað ikki byrjað at kripla í fingrunum hjá rógvarunum eftir at sleppa í gongd aftur enn.

Sekstan fólk róðu teir 2.000 metrarnar í neystinum hjá Klaksvíkar Róðrarfelag leygardagin, og eftir lokna kapping, vórðu heiðursmerkir og kekkar handað.

Tað er Norðoya Sparikassi, sum stuðlaði kappingini og lat vinningarnar og heiðursmerkini.

## Úrslit frá NS Open:

**Gentur undir 18 ár:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Ebba Mortensen | 8:50:70 |
| 2 | Sunrid Mørkøre | 9:15:40 |
| 3 | Hellen Jacobsen | 9:19:00 |

**Dreingir undir 18 ár:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Kristian Olsen | 6:42:50 |
| 2 | Martin Berg | 7:01:80 |
| 3 | Sigfríð Hansen | 7:16:10 |

**Menn, lættvekt:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Uni Oknadal | 6:42:80 |
| 2 | Snorri Patursson | 6:47:80 |
| 3 | Mogens Petersen | 7:22:80 |

**Menn, tungvekt:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Jón Rosenblad | 6:16:00 |
| 2 | Bárður Brimvík | 6:35:30 |
| 3 | Símun M. Kerlok | 6:42:70 |



TB-NSÍ 2-5 (1-4):

# Tvøramenn komu ov seint í gongd


*Allan Michelsen og liðfelagarnir í TB mistu alt á gólvið innan tríggjar minuttir í fyrra hálvleiki, tá NSÍ broytti støðuna frá 0-0 til 0-3*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

**Tvøramenn royndu hvat teir kundu móti NSÍ, men tað var ikki fyrr enn í seinna hálvleiki við støðuni 1-4 at TB megnaði at trýsta runavíkingar. NSÍ vann til síðst uppiborið, og er framvegis við í stríðnum um meistaraheitið**

FÓTBÓLTUR
*Bjartur Nolsøe*

Tað hevur gingið illa hjá TB seinastu umførini. Liðið lá undan vikuskiftinum á niðasta plássið eitt stig aftanfyri Skála. Og mótstøðuliðið á Sevmýru sunnudagin var NSÍ, so tað fór neyvan at verða lætt. NSÍ hevur framvegis meistaraheitið at berjast fyri, og tí var lagt upp til ein spennandi dyst. Og tað bleiv eisini ein undirhaldandi dystur við nógvum málum. Fyrsta korterið gekk javnt á og lítil og ongin munur var at hóma.

### Gjørdu skjótt av

Men so gjørdi runavíkingar eitt veruligt hál, tá teir skoraði trý mál uppá 5 minuttir. Fyrst var tað Jónstein Petersen sum spældi Óla Hansen púra frían so hesin hevði lætt við at seta bóltin í mál.

Tað bleiv 2-0 tá Sjúrður Jacobsen spældi ein langan bólt inn um verjuna hjá TB, og har var Sonni L. Petersen og skeyt bóltin framvið Lars Muller í TB-málinum.

Tá so Gert Langgaard skoraði til 3-0 eftir eitt innlegg, trúðu flest øll at tað fór at verða talan um eitt veruligt skrædl. Men tað kom stígur í eftir hetta og sjálvt um onkrar royndir vóru móti báðum málum, kom onki mál aftur fyrr enn 5 minuttir restaðu av fyrra hálvleiki. Aftur var tað NSÍ sum fekk mál. Ian Højgaard spældi við einari góðari avlevering Jónstein Petersen frían, sum rak framvið Lars í málinum og so var 4-0.

Hetta líktist einari avgerð, men TB svaraði aftur beint fyri hálvleik. Dan Mortensen sendi ein bólt inn í brotsteigin hjá NSÍ, verjan fekk ikki bóltin burtur og so kundi Vladimir Matijivic við einum góðum skoti minkað um munin til 1-4.

### TB fekk vónina aftur

NSÍ hevði verið betra liðið í fyrra hálvleiki og trygga leiðslan gjørdi, at onki sá út hjá TB tá seinni hálvleikur skuldi byrjað. Men tvøramenn komu út við einum veruligum stríðsanda til seinna hálvleik. Teir royndu at flyta spælið fram á vøllin, og sjálvt um teir ikki fingu nakað burturúr fyrstu løtuna av seinna hálvleiki, mistu teir ikki mótið og hildu fram við framsøkjandi spæli. Og endin var at royndirnar frá TB góvu úrslit, tá okkurt um 20 minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki.

Kaj Roest gjørdist leysur móti málinum og tá Jens Martin Knudsen kom út í móti honum, sendi hann bóltin framvið Jens Martin og í mál.

Nú kom rættuligt lív í dystin og væl hjálptir av áskoðarunum, royndi heimaliðið at leggja eitt síðsta trýst á NSÍ. Og tað eydnaðist eisini og næstu løtuna sat TB á dystinum. Dan Mortensen fekk møguleikan at minkað enn meiri um munin, men hann rakti ikki málið tá hann kom at standa væl fyri.

Men sum so ofta hendir í slíkum støðum, so fer hitt liðið í mótálop. Tá eitt korter var eftir fór tann síðsta luftin úr tvøramonnum tá NSÍ fekk sítt fimta mál. Verjan hjá TB fekk ikki sparka bóltin vekk, ein runavíkingur kom í millum og endin var, at Jónstein Petersen kundi skjóta bóltin í mál til endaliga úrslitið 5-2 til NSÍ.

Við sigrinum varðveitti NSÍ støðu sína í oddinum.Næsti dystur hjá NSÍ er móti B68 í Runavík. TB skal næsta vikuskiftið til Skála og verður hetta er ein rættuliga avgerandi dystur.

### Dysturin í tølum:

**TB-NSÍ 2-5(1-4)**
0-1: Óli Hansen 17
0-2: Sonni L. Petersen 19
0-3: Gert Langgaard 20
0-4: Jónstein Petersen 37
1-4: Vladimir Matijevic 45
2-4: Kaj Roest 63
2-5: Jónstein Petersen 73
Dómari: Petur Skarðenni

TB: Lars Müller - Óli Johannesen, Nebosja Urtajl, Vladimir Matijivic, Einar Petersen, Olivur Abrahamsen, Dan Mortensen, Bárður Dimon, Jón Johannesen, Kaj Roest, Allan Michelsen
NSÍ: Jens Martin Knudsen – Arnfinn Langgard, Djóni N. Joensen, Ian Højgaard, Gert Langgaard, Jónstein Petersen, Sonni L. Petersen, Óli HJansen, Pól Thorsteinsson, Brynjolvur Nielsen, Sjúrður Jacobsen

HB-ÍF 0-1 (0-0):

# HB í botni

**Teir næstbestu hjá HB taptu týdningarmikla heimadystin móti ÍF, og hava nú bert ein dyst eftir í royndunum at halda sætið í bestu mansdeildini**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Støðan er heldur tvíbýtt hjá HB í løtuni. Besta mansliðið liggur á odda í fyrstu deild við greiðum útlitum fyri einum meistaraheiti, og tað er sjálvandi gleðiligt. Men hinvegin dregur tað nógv niður, at næstbesta liðið í løtuni er í tungum andróðuri. Seinastu vikurnar hevur liðið hildið til á niðasta sessinum, og tað sigur seg sjálvt, at tað ikki er nakað serligt, um felagið komandi ár skal leita niður í triðju deild eftir eykaspælarum til besta liðið.

### Panikkloysnir

Tí var tað av alstórum týdningi, at trý stig fingust burturúr, tá ÍF vitjaði leygardagin, og tí var vónbrotið eisini sera stórt, tá tað var staðfest, at ÍF streyk avstað við øllum stigunum.

Fuglfirðingar høvdu í sínum lagi eisini nógv at stríðast fyri. At 1979 er langt síðani, munnu flestu fuglfirðingar hava ásannað, og fyri fyrstu ferð var liðið undan hesum umfarinum í veruligum vanda fyri at flyta niður í triðbestu deildina.

Tí stóð nógv á hjá báðum pørtum, tá farið varð undir dystin sunnudagin, og tað sást serliga í verjupartinum, har talan ofta gjørdist um panikkloysnir, tá bólturin skuldi ruddast burtur. Á miðvøllinum var stuttligt at síggja, hvussu teir báðir veteranarnir, Ingi Rasmussen og Pauli Jarnskor, dystaðust um yvirtakið, sum tað tó ongan tíð eydnaðist nøkrum partinum at fáa fult og heilt.

Sum sagt, so var talan í fleiri førum um ótrygt verjuspæl, og tað var eisini fyrst og fremst hetta, sum skapti teir møguleikar, sum vóru í dystinum. Undan steðginum høvdu bæði liðini einar tveir heilt góðar møguleikar í part. Heini Heinason var mest sum leysur í vinstra borðið hjá ÍF tað einu ferðina, og í hinum endanum skeyt Gunnar Mohr beint á málverjan, eftir at hava bandað seg ígjøgnum ÍF vejruna. Nærmast við mundi HB tó vera, tá Bjarni Jørgensen sendi fríspark á sjálva samankomingina, og Heini Gaard síðani fluktaði returin við síðuna av málinum.

### Yvirvág gav úrslit

Seinastu løtuna undan steðginum var tað kanska ÍF, sum hevði eina lítla yvirvág, og stutt inn í seinna hálvleik fingu teir so tað, sum skuldi vísa seg at vera avgerandi málið í dystinum.

HB verjuleikari var óskettin, tá bólturin var spældur út móti borðinum, og so streykt Heini avstað. Hóast tveir leikarar vóru fyri, so var kósin sett, og eftir eina langa draging smekkaði hann til, so bólturin streyk inn um nærmara stólpan.

Í løtunum eftir hetta hevði ÍF eisini møguleika at økja um leiðsluna, men so við og við fullu teir longur aftur á vøllin til tess at verja um leiðsluna. Hetta eydnaðist teimum eisini uttan stórvegis trupulleikar, og við sigrinum syrgdu teir fyri, at niðurflytingarvandin eina feðr med alla varð skúgvaður til viks, og nú er tað ístaðin møguleikin fyri heiðursmerkjum, sum tosað verður um, men til tess krevst ein sigur á FS Vágum í seinasta dystinum, og tann uppgávan er í øllum førum ríkiliga stór.

Til stuttleikar kann nevnast, at HB – sum altso er niðast – er einasta liðið, sum hevur bast vágamonnunum í ár, men hetta munnu ter reyð/svørtu ikki hugsa so nógv um í løtuni. Heldur er tað niðurflytingarvandin, sum nú er heilt álvarsligur, sum spøkir í tonkunum, og fyri teir er tað nú altavgerandi, at ein sigur fæst burturúr seinasta dystinum, sum verður í Klaksvík.

### Dysturin í tølum

HB-ÍF 0-1 (0-0)
0-1: Heini Heinason